# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Bók um krígsárini:

# Danir keypa Valentine

Síðan bókin "Operation Valentine – Anden verdenskrig på Færøerne", kom út í februar hevur sølan gingið væl, serliga í Danmark, har hon eisini verður nógv útlánt á bókasøvnum, sigur rithøvundurin Bjarni Åkesson Filholm.

Hann fegnast eisini um, at bókin fær góð ummæli í donskum bløðum og tíðarritum, umframt at føroysku bløðini Sosialurin og Dimmalætting hava skrivað um bókina. Bløð sum t.d. Fyns Stiftstidende, JyllandsPosten, Nordjyske Stiftstidende og Bornholms Tidende hava gjørt nógv burtur úr og givið bókini góð ummæli. Bókin er eisini ummæld av t.d. De danske Bogmarked, Rundt om Bogen og Siden Saxo.

Á heimasíðuni hjá Forlaget Nautilus, sum gevur bókin út stendur m.a. *Da Tyskland besatte Danmark, fik englænderne travlt. Få dage senere besatte de Færøerne, som med deres strategiske beliggenhed ude i Nordatlanten under ingen omstændigheder måtte komme i tyskernes hænder. Englændernes aktion havde kodenavnet Operation Valentine.*

*Den britiske besættelse af Færøerne er et spændende kapitel af historien om Danmark under krigen. Forfatteren Bjarni Åkesson Filholm, der er bosat i Danmark, men har færøske rødder, har gravet dybt i arkiverne og fortæller historien om Operation Valentine og dens følger - både med sans for de store linjer og med øje for de konsekvenser, krigen fik for den færøske dagligdag og forholdet mellem Danmark og Færøerne.*

Hóast nógv er givið út um krígsárini á føroyskum, heldur Bjarni, at tørvur hevur verið á at skriva søguna um hersetingina av Føroyum á donskum. Fáir danir kenna nakað til føroyska søgu, og tað kann vera ein orsøk til góðu undirtøkuna, bókin hevur fingið.

Bókin, sum er 128 blaðsíður, kann bíleggjast ella fáast til keyps í føroysku bókahandlunum.

*mg*






*Bjarni Åkesson Filholm*

†

Kunngjørt verður, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jokild Poulsen**
úr Fuglafirði
vanliga nevnd Kittan

andaðist leygarmorgunin 9. mai á Landssjúkrahúsinum, 84 ára gomul.
Jarðarferðin verður týsdagin 12. mai kl 14 úr Fuglafjarðar kirkju. Sálmabókin verður brúkt.

*Familjunnar vegna*
**Jørleif, Sonja, Jónsvein og Jógvan Finnur**

Tey, ið vilja minnast Kittuna kunnu lata eina gávu til Fuglafjarðar kirkju, konta í peningastovnunum.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri maður mín

**Hans Jacob Hansen**
Miðvágur

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar, peningargávur til kirkjuna og troystarík orð frá tykkum øllum.
Tøkk til Sverra Steinhólm, prest, fyri góð og troystarík orð í kapellinum á Landsjúkrahúsinum, og tøkk til David Johannesen, prest, fyri góð, beinrakin og troystarík orð við jarðarferðina úr Miðvágs kirkju. Tøkk til sangara, berarar, kirkjutænarar og gravarar.
Eina serstaka tøkk til tykkum á Sýnini fyri góðsku tykkara til okkum bæði hesa seinastu tíðina hjá Hans Jacob her á fold.
Eina hjartans tøkk til tykkum, ið á ymsan hátt syrgdu fyri ervinum og til seinast: Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu Hans Jacob til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Ida**

**Dagurin**
**11. mai. Mamertus**, deyður í 475. Biskupur í Suðurfraklandi. Hann varð tikin av døgum.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*